**Sjálvstøðugar Føroyar – nógv fleiri “ja” enn “nei**

800 føroyingar vórðu við í Spyr-kanning  21. september, sum setti spurningin:

«Tekur tú undir við, at Føroyar skulu vera sjálvstøðugt land?»

Svar-bólkarnir vóru tríggir – «ja», «nei» og «eg veit ikki.»

**Nógv størstur av hesum var bókurin sum segði «ja».**

48,5 prosent av teimum spurdu svaraðu «ja», at tey taka undir við, at Føroyar skulu vera eitt sjálvstøðugt land.

Minni enn ein triðingur av teimum spurdu svaraðu «nei» -  32,25 prosent.

Tey góðu 19 prosentini harímillum svaraðu «veit ikki.»




| | Everybody (800) | Kvinnur (378) | Menn (422) |
|---|---|---|---|
| Ja | 48.50% | 36.77% | 59.00% |
| Nei | 32.25% | 38.10% | 27.01% |
| Veit ikki | 19.25% | 25.13% | 13.98% |

Av teimum, sum søgdu nei, vóru eitt sindur fleiri eldri og færri ung. Millum ung vóru 30 prosent, sum svaraðu nei. Greiðasta «ja» fekst í høvuðsstaðarøkinum, har 53,5 prosent søgdu ja til sjálvstøðugar Føroyar og bert 26 prosent søgdu nei.




| | Everybody (800) | Tórshavn (338) | Rest (462) |
|---|---|---|---|
| Ja | 48.50% | 53.55% | 44.81% |
| Nei | 32.25% | 26.33% | 36.58% |
| Veit ikki | 19.25% | 20.12% | 18.61% |

Q8

Single Choice

Tekur tú undir við, at Føroyar skulu vera sjálvstøðugt land?




| | Everybody (800) | 18 - 29 (159) | 30 - 44 (209) | 45 - 59 (216) | 60 - 80 (216) |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja | 48.50% | 42.14% | 48.80% | 51.85% | 49.54% |
| Nei | 32.25% | 30.19% | 30.62% | 32.87% | 34.72% |
| Veit ikki | 19.25% | 27.67% | 20.57% | 15.28% | 15.74% |